Islam og Muhammed

FAKTA

Ein pílagrímur merkir ein fremmandur. Her merkir tað ein, ið ferðast til ein heilagan stað.



FAKTA

Allah er arábiska orðið fyri Gud.

Árið hjá muslimum lagar seg eftir mánanum. Tað hevur 12 mánaðir, sum eru annaðhvørt 29 dagar og 30 dagar. Av tí at árið er 354 dagar í mun til okkara 365 dagar, so flytast høgtíðir teirra 10 – 11 dagar aftureftir í mun til okkara almanakka.

Islam eitur átrúnaðurin hjá muslimum. Islam lærir, at Adam var fyrsta menniskja og fyrsti muslimur. Eisini var hann tann fyrsti av Guds profetum. Síðani komu aðrir profetar honum á baki, men tað, teir lærdu um vilja Guds við fólki sínum, rein líkasum ikki rættiliga við. Ikki fyrr enn Muhammed varð kallaður, kom vend í. Hann er tann seinasti og størsti av Guds profetum.

Muhammed varð borin í heim í Mekka í 570 í tí, sum nú eitur Saudi-arábia. Pápin doyði, meðan Muhammed enn var smádrongur, og áðrenn hann var hálvvaksin, doyði mamman. Hann vaks upp hjá einum pápa-beiggja, og tá hann var tilkomin, fór hann í tænastu hjá eini ríkari keyp-manseinkju, sum æt Kadidja. Hann royndist væl bæði sum sølumaður og eisini sum handilsferðandi í grannalondunum. Kadidja og hann gjørdust góð og giftust. Nú var Muhammed ein múgvandi maður.

Arábar høvdu tá á døgum eina ørgrynnu av gudum. Tað var næstan soleiðis, at hvør bygd hevði sín gud. Men ein gudur bar av øllum. Tað var Allah, skaparin, hann sum helt øllum uppi. Einaferð um árið fóru arábar til Mekka at vitja halgidómin, og henda pílagrímsmánað máttu øll í landinum binda frið.

Á ferðum sínum var Muhammed vorðin hugtikin av kristindóminum og Jesusi, sum frelsti fólk. Um tey trúðu á hann, nýttist teimum ikki at frykta fyri dómadegi. Arábar høvdu ongan slíkan profet, og kortini skuldu teir á dómadegi fyri dómaran at gera roknskap fyri lívið. Hann hugsaði djúpt um hetta, men fann einki svar.

Tað sigst, at eina náttina, hann var á einum oydnum staði, vísti eingilin Gabriel seg fyri honum og kallaði hann til profet. Muhammed fekk seinni fleiri tílíkar opinberingar. Tá gjørdist hann sera illa fyri, fekk fepur og lá og ristist. Tað tulkaði hann soleiðis, at hetta av sonnum var Guds kall.

? rein við · tilkomin · ørgrynnu · frykta fyri

Muhammed fekk stóra mótstøðu, men hann helt á at prædika um, at tað bert er ein gud, Allah, og Muhammed er profetur hansara. Í 622 noyddist Muhammed at flýggja til Medina. Muslimar góvu hesari hending so stóran týdning, at teir gjørdu av, at hava tíðarroking sína frá hesum ári, eins og kristin hava sína tíðarrokning frá Kristi føðing. Muhammed doyði 10 ár seinni í árinum 632.

Medina í Saudiarábia. Muslimar gera seg klárar at biðja í Nabawimoskuni. Undir grøna hválvinum er Muhammed grivin.

Koranin er vakurt innbundin, skrivað við vakrari kalligrafi og skal helst berast í hjartahædd.

Visti tú

at onkur eisini skrivaði orð Gabriels til Muhammed á herðablaðið á einum kameli?

FAKTA

Rósukransurin hevur 33 ella 99 perlur, sum ímynda tey 99 vakrastu nøvnini, Allah hevur (nr. 100 eigur Gud sjálvur). Rósukransurin verður ofta nýttur í sambandi við bøn.

Koranin

Koranin er heilaga bókin hjá muslimum. Eingilin Gabriel las fyri Muhammedi úr eini himmalbók, og Muhammed legði seg eftir at minnast alt uttanat. Restina av lívi sínum fekk hann javnan tílíkar opinberingar, sum hann síðan endurgav fyri vinum sínum. Teimum varð álagt neyvt at minnast til alt. So við og við vóru frásagnirnar skrivaðar í brotum á tað, sum var fyri hond: pergament, leður, bark o.a.

Stutt eftir deyða Muhammeds vóru øll brotini savnað í eina bók, Koranina. Hon er orð Allah til muslimar, soleiðis sum hann talaði tað gjøgnum Muhammed profet. Tí hevur Koranin og tað, sum stendur í henni, so stóran týdning fyri muslimar. Koranin er í kapitlum, 114 í tali. Hon er á arábiskum, tí máli Muhammed tosaði. Mangir muslimar leggja seg eftir at læra Koranina uttanat, so at orð Allah verða verandi óbroytt.

Aftur at Koranini hava muslimar Sunnaina. Tað er alt, ið Muhammed hevur sagt og gjørt, savnað í einari bók.

Muslimskar trúargreinar

Muslimar verða í høvuðsheitum bólkaðir í tveir partar alt eftir, hvat teir halda vera týdningarmest.

Sunnimuslimar eru nógv tann størsti bólkurin. Teir halda fast við, at Sunna, kunnleikin um, hvussu Muhammed livdi, er týdningarmest, av tí at Muhammed er tann seinasti og størsti av Guds profetum.

Shiamuslimar eru nógv færri. Teir hava serliga útvaldar leiðarar at útleggja innihaldið í Koranini. Shiar mugu so fylgja tí, sum hesir leiðarar koma til.

Visti tú

at Ábraham átti Ísmael við trælkvinnuni Hágar. Hann verður roknaður sum ættfaðir at arábum. Við konu síni Sáru átti Ábraham Ísak, ein av ættfedrunum hjá jødum.
Úr 1. Mós 16 og 21

Mekka

Mekka er heilagi býurin hjá muslimum. Muhammed hertók hann í 630. Har stóð ein bygningur, á skapi sum ein terningur, Kabain, sum Ísmael og Ábraham høvdu bygt til bønarstað. Hildið var, at hetta var miðjan í verðini og Guds staður. Tí er tað ikki løgið, at muslimar royna at fara pílagrímsferð til Mekka í øllum førum eina ferð í lívinum, og tá teir biðja, skulu teir venda sær móti Mekka. Tey deyðu verða jarðað við andlitinum vendum móti Mekka, og muslimar hugsa eisini um kósina móti Mekka, tá ið teir reisa moskur og onnur hús.

Hurðin inn í Kabaina. Hurðin er úr reinum gulli. Kabain er meginhalgidómurin í arábiska heiminum.



Mekka í Saudiarábia. Biðjandi muslimar við Kabaina. Kabain er klødd við teppi, sum verður skorið í petti, sum pílagrímar kunnu keypa sum minnislutir.

? útleggja · kósina

Tær fimm súlurnar

Allir rætttrúgvandi muslimar skulu vísa sína trúgv við at halda ávísar átrúnaðarligir siðir og reglur. Tær eru givnar av Gudi og eru óbroytiligar og ævigar. Allir muslimar hava skyldu til at halda hesar 5 reglur, sum vit kalla tær *5 súlurnar*, sum islam byggir á:
Trúarjattan, bøn, føsta, olmussa og pílagrímsferð/ir.

1 Trúarjáttan *shahada*

Tað er bert er ein gud, Allah, og Muhammed er profetur hansara. Trúarjáttanin skal sigast minst eina ferð í lívinum, og tá hon verður søgd, meðan onnur hoyra, so kanst tú kalla teg muslim. Trúðarjáttanin verður teskað í oyrað á nýføðingum og er eisini við, tá kallað verður til bøn.

2 Bøn *salah*

5 bønir skulu biðjast hvønn dag. Ein fyri dag, ein beint eftir middag, ein miðskeiðis seinnapart, ein við sólsetur og ein um kvøldið. Flestu dagar er ikki neyðugt at fara í moskuna at biðja, men fríggjadag skulu allir menn fara í moskuna, har ein imamur talar og leiðir bønina. Kvinnurnar gera, sum tær vilja, um tær fara við. Fara tær í moskuna, eru tær annaðhvørt í einum øðrum rúmi ella fyri seg sjálvar í sama rúmi, sum menninir. Tá kallað verður til bøn, verður hetta sagt:

- Allah er størstur (4 ferðir)
- Eg vitni, at eingin gud er uttan Allah (2 ferðir)
- Eg vitni, at Muhammed er profetur hansara (2 ferðir)
- Kom til bøn (2 ferðir)
- Kom til frelsu (2 ferðir)
- Allah er størri (2 ferðir)
- Eingin gud er uttan Allah (1 ferð)

3 Føsta *salum*

Muslimar fasta ofta av sínum eintingum, men *ein* føsta er áløgd níggjunda mánaðin hjá muslimum. Hann eitur ramadan, og tað er eisini navnið á føstuni. Hon varir ein mánað, og henda mánaðin má ein muslimur hvørki eta ella drekka frá sólarrisi til sólseturs.

4 Olmussa *zakah*

Muslimar trúgva, at Allah gevur teimum tímiliga vælferð: ognir og pening. Við at lata burturav, takka teir Allah fyri allar góðar gávur. Tað er ikki óvanligt at lata ein fýraogtjúgundapart av síni ogn og inntøku eina ferð um árið. Hetta er serliga í sambandi við ramadan.

5 Pílagrímsferð *hadsj*

Ein muslimur eigur, um tað ber honum til, at fara til Mekka minst eina ferð í lívinum. Áðrenn teir koma til Mekka, verða teir latnir í ein einfaldan, hvítan búna. Hann ber boð um, at nú nærkast heilagi staðurin. At vera eins klæddur ber eisini boð um, at øll eru eins fyri uttan mun til ríkidømi og umstøður annars.

Rustempasamoskan í Istanbul í Turkalandi. Menn biðja.

? skyldu til · miðskeiðis · eintingum



FAKTA

Ein imamur er tann, sum leiðir bønina í moskuni.

Ein imamur hevur ikki tørv á at hava serliga útbúgving fyri at leiða bønina. Bæði týdningarmiklir átrúnaðarligir muslimskir leiðarar, teologar og lógarkønir verða nevndir imamar.

FAKTA

Allir muslimar gera ikki alt tað, ið islam áleggur teimum at gera, eitt nú at biðja 5 ferðir um dagin. Øll kristin gera heldur ikki alt tað, ið kristindómurin áleggur teimum, t.d. at halda hvíludagin heilagan.

Moska

Fyri muslimar er moskan týdningarmesti karmurin um átrúnaðarliga samveru. Har eru fleiri rúm, men miðskeiðis í moskuni er eitt stórt bønarrúm, *musalla*. Har eru eingi sitipláss, men teppi vend móti Mekka eru at biðja á. Tá muslimar fara inn í moskuna, lata teir seg úr skónum og vaska sær um føturnar. So eru teir klárir til bøn. Kvinnur og menn eru skild sundur í moskuni, við hvørt í hvør sínum rúmi. Flestu moskur hava ein talarastól, *minbar*, eitt sindur hægri enn gólvið, haðani ein imamur leiðir fríggjadagsbønina. Hetta stavar frá sjálvum Muhammedi profeti, sum talaði til fólkið, standandi trý trin hægri uppi. Flestu moskur í muslimsku londunum hava eisini eina *minaret*, eitt høgt torn, haðani kallað verður til bøn úr einum hátalara. Ongar myndir eru í moskuni, men ofta er hon rættiliga prýðilig hóast tað. Tað er ikki loyvt at avmynda Allah og Muhammed. Tað verður beinleiðis roknað sum halgibrot. Tó eru moskur sera vakrar, pyntaðar við litføgrum mynstrum og brotum úr Koranini skrivað við listskrift, nevnd *kalligrafi*.

Moskur eru ofta eisini savningarstað hjá muslimum. Har savnast teir til máltíð eftir sólsetur í føstumánaðinum Ramadan, til serligu høgtíðirnar og til at skifta orð um trúarspurningar.

Kendastu moskurnar eru Klettamoskan í Jerúsalem, sum sigst standa á tí staði, har Muhammed profetur einaferð fór upp til himmals á einum hesti við veingjum. Hetta er elsti muslimski halgidómur. Hin er Umayyademoskan í Damaskus, sum varð bygd í fyrstu muslimsku tíðini. Har sigst høvur Jóhannes doyparans liggja goymt.

Normoskan í Oslo í Noregi.

Tað er bert er ein gud, Allah,
og Muhammed er profetur hansara.

Lívshátíðir

Føðing

Muslimar siga, at eitt barn er ein gáva frá Allah og tessvegna ein sera stór ábyrgd. Barnið verður alt upp í sínum átrúnaði at verða arbeiðssamt og ábyrgdarfult. Islamska bønin verður sum sagt teskað í vinstra oyrað á barninum. Tað ger pápin ella ein imamur.

Sjey dagar gamalt fær barnið navn, og hildin verður ein veitsla. Hárið verður rakað av barninum og vigað. Sama vekt verður so givin teimum fátæku í silvuri, so sum ein av grundsúlunum fyrisetur. So fær barnið navn. Tað er týdningarmikið, at tað er tað rætta navnið. Øll muslimsk nøvn merkja okkurt. Summi halda eisini eina veitslu, tá barnið er eini fýra – fimm ár. Tá sigur barnið uttanat tær fyrstu reglurnar úr Koranini. Tá endurgivið verður úr Koranini, er tað altíð á arábiskum.

Mong børn eita eftir Muhammed ella onkrum í ætt hansara. At eita okkurt av teim 99 nøvnum Allah, er eisini heilt vanligt.

Islamsk dreingjabørn verða ofta umskorin og í summum londum eisini gentubørn. Øll eru ikki samd um, hvørt Muhammed sjálvur var umskorin, og um hetta kann rættvísgerast sambært Koranini. Viðvíkjandi gentubørnum sigur Koranin als einki um umskering. Tá tað verður gjørt í summum londum, ofta afrikanskum, er hetta grundað á siðvenju.

FAKTA

Muslimsk nøvn
Muhammed: hin høgt æraði
Zena: hin vakra
Rashid: vegleiðari
Mustafa: hin útvaldi

FAKTA

Tá gentur verða umskornar, hendir tað sambært hadith, siðvenju. Við umskeringina verður skorið av kvinnuligu kynslutunum og seymað aftur. Tað er ójavnt, hvussu mikið verður tikið burtur.

Skiftið til vaksnamannalívið

Islam ger ikki nakað serstakt burturúr, tá eitt barn verður vaksið ella tannáringur. Men barnið lærir í sínum uppvøkstri, hvat ein góður muslimur er. Tað lærir at biðja og at bera seg rætt at, bæði í moskuni og millum fólk. 7 ára gomul fara muslimsk børn í Koranskúla í moskuni, har tær læra at lesa Koranina, sum er á arábiskum. Í Koranini stendur, hvussu ein muslimur eigur at liva og bera seg at. Tá eitt barn er um 13 ára aldur, verður roknað við, at tey eru sjálvstøðug átrúnaðarliga. Stórur dentur verður lagdur á tær fimm súlurnar og trúarjáttanina, bønina og føstuna. Sum tannáringar skulu gentur og dreingir ikki vera saman, uttan vaksin eru til staðar. Lýdni, rættvísi og reinføri seta nógv muslimsk foreldur æru í.

Hjúnalag

Foreldrini at teimum báðum pørtunum avtala sum oftast hjúnalagið. Men Sharialógin, sum merkir ein leið, sum skal haldast, gevur brúður og brúðgómi rætt til at siga nei til tann, foreldrini hava valt.

Undan brúdleypinum avtala foreldrini eina heimanfylgju, sum kann vera peningur ella aðrar ognir, og skriva eina avtalu. Heimanfylgjan kann ikki verða kravd aftur. Hon er upprunaliga ætlað sum trygd, um hjúnalagið ikki varð so gott, sum væntað.

Muslimsk hjúnavígsla. Imamurin og brúðgómurin taka í hondina á hvørjum øðrum.

Meðan vígslan fer fram, sita brúður og brúðgómur í hvør sínum rúmi. Tey hava hvør sítt vitni, sum gongur ímillum við teimum boðum, sum neyðug eru. Ein imamur ella onkur annar muslimskur maður lesur úr Koranini og tosar um skyldurnar, tey hava sum hjún. Tríggjar ferðir verða tey spurd, um tey góðtaka hjúnalagið. Vitnini bera so svarini ímillum. Síðan skrivar brúðarparið undir tær hjúnalagsreglur, sum eru nevndar í avtaluni. Biðið verður um, at tey verða eins eydnurík og Muhammed profetur og Khadidja, fyrsta kona hansara. Muhammed var fleiri ferðir giftur.

Muslimsk brúdleyp vara ofta í tríggjar dagar. Fyrsta dagin halda tey veitslu hvør sær við vinum og familju. Annan dagin leiðir brúðgómurin brúður sína til heim sítt. Triðja dagin tekur brúðurin ímóti vinum og familju í nýggja heimi sínum.

Koranin sigur, at ein maður kann hava 4 konur, men bert um hann kann tryggja øllum somu kor. Av tí at flestu lond ikki loyva, at ein maður er giftur við fleiri samstundis, hava flestu muslimskir menn bert eina konu. Hjúnaskilnaður er bert loyvdur sum evsta loysn, sigur Koranin.

FAKTA

Koranin sigur einki um, at kvinnur skulu bera slør. Tó verður tað væntað, at tær klæða seg sømiliga. Tað merkir eftir muslimskari siðvenju, at menn kunnu hava beran yvirkropp, men kvinnur skulu ikki vísa hár, armar og bein og ikki vera í klæðum, sum sita ov tætt at kroppinum.



? vitni · evsta

Deyði

Tað eru nógvir siðir og skikkir tengdir at deyðanum í øllum átrúnaðum. Tá ein muslimur doyr, eru siðirnir bundnir at tí líváskoðan og lívsførslu, muslimar hava. Er andlátið væntað, so er tað gott, um tann, sum skal hiðani, fær biðið um fyrigeving fyri sínar gerðir og viðurkent, at eingin gud er uttan Allah, og Muhammed er profetur hansara. Letur hetta seg ikki gera, so eiga næstringarnir at gera tað. Síðan verður líkið vaskað. Maður vaskar manni, og kvinna vaskar kvinnu. Summi smyrja líkið við olju ella kamfer og balla tað í hvítt klæði.

Best er, um jarðarferðin kann verða sama dag. Í nógvum londum verða tey borin til gravar heldur enn koyrd. Í mongum londum hava muslimar egnar gravstaðir. Tað kemst av, at tey skulu liggja á høgru síðu lítandi móti Mekka, heilaga býnum hjá muslimum.

Í londum, har fólk vanliga verða løgd í kistu, og har eingir muslimskir gravstaðir eru, verða muslimar eisini grivnir í kistu í vanligum kirkjugarði.

Islam lærir, at sálin bíðar eftir dómadegi, men bíðitíðin er stutt, sum eitt eygnabrá. Á evsta degi kemur lønin, tá Allah skal døma tey eftir lívsførslu. Í lívinum hava tey havt tveir einglar, sum hava fört roknskap yvir góðar og óndar gerðir. Teir handa Allah roknskapin, og so er tað hann, sum ger av, hvørt ein kemur í Paradís ella í Helviti. Muslimar seta sína vón til, at Allah er góður og miskunnsamur.

? tengdir at · næstringarnir · eygnabrá

Muslimar biðja á Ráðhúsplássinum í Keypamannhavn í Danmark.

Útbreiðsla

Tá vit rokna, hvussu mong fólk eru muslimar, hugsa vit um tey, sum búgva í londum, sum siga seg at vera muslimsk. Ikki hvussu virknir muslimar, tey eru. Tí verður roknað við, at tað eru umleið ein milliard muslimar í verðini, og at Islam er næststørsti átrúnaðurin. Størstur er kristindómurin. Muslimar um allan heim kenna seg at hoyra saman í einum trúarfelagsskapi. Hesin verður nevndur *Umma*.

Muslimar í Evropa liva sum minnilutar við teimum trupulleikum, minnilutar altíð hava, t.d. at halda fast við mál, trúgv, siðvenju og livihátt, um tað víkir ov nógv frá meirilutanum. Hesir muslimar koma helst úr ymsum londum, við ymiskum mentanum. Teir tulka Koranina og Sunnaina ymiskt, og summir leggja kanska ikki so nógv í, hvør tulking verður nýtt. Tískil ber ikki til at siga, hvussu muslimar eru, ella hvat muslimar halda.

Visti tú

at bert 1/6 av øllum muslimum eru arábar.